# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Próvhandan í psykiatri

Fríggjadagin 6. februar var próvhandan í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, har tey sum vóru liðug í "Tvør økiseftirútbúgvingini í psykiatri" fingu prógv.

**Aftara rað:** f.v.: Lars Østrup Brøgger, seminarlærari, Lisbeth Dybro, skeiðleiðari, Malan Hansen sosial- og heilsuassistentur, Guðrið í Bartalsstovu, sosial- og heilsuassistentur, Kala Debes, sosial- og heilsuassistentur, Ingun Durhuus, sjúkrarøktari, Irdi Danielsen, ergoterapeutur, Elsebeth Sanna á Krákusteini, pedagogur, Elsa Klein Olsen, pedagogur, Malan B.Hansen, sosial- og heilsuassistentur, Heðin Samuelsen, hjálpari, Inga A.M. av Reyni, pedagogur, og Marianna Vang, ergoterapeutur.

**Fremra rað f.v.:** Ann-Britt Mortensen, sosialráðgevi, Randi Borðoy, sjúkrarøktari, Jóhanna við Streym, sjúkrarøktari, Sunrid á Borg, sjúkrarøktari, Jana Mortensen, sjúkrarøktari, Birgit Andersen, deildarsjúkrarøktari, Marnar Tausen, røktari, Óluva Poulsen, sjúkrarøktari, og Ása Isaksen, sjúkrarøktari.

Hesar vanta á myndini: Sofía Elisa Hansen, sjúkrarøktari, og Joana Sørensen, sosial- og heilsuassistentur.

Rani Vardum:

# 30 ára starvsdag



1. februar 2009 hevði Rani Wardum politistur í Havn 30 ára starvsdag

Rani er 51 ára gamal og havnarmaður.

1. februar 1979 gjørdist hann politistanæmingur. Eftir lokna útbúgving varð hann settur sum politistur í Havn.

Hann var politistur í Århus frá 1. februar 1987 til 1. juni 1989, tá aftur bleiv settur sum politistur í Havn.

## †

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Thor Jacobsen** verður úr Sandavágs kirkju mánadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Thor kunnu lata Meinigheitshúsinum í Sandavági eina peningagávu. Konta í peningastovunum.

Lítla elskaða **Katrin Elisabeth**, dóttir Rigmor og Jens Mortan Rasmussen á Skála, andaðist í heiminum 7. februar, eitt ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

# Brynhild Djurhuus 65 ár

Í dag, mánadagin 9. februar 2009, fyllir Brynhild Djurhuus 65 ár.

Brynhild er ættað úr Vági og er í dag búsitandi í Danmark. Hon er dóttir Ragnhild, f. Nicodemussen, ættað úr Skálavík og Andreas Djurhuus, vanliga nevndur Diurin, ættaður úr Porkeri, sum fylti 100 ár í januar í ár.

Brynhild tók preliminerprógv í Vági í 1960, og varð útlærd sum skrivstovukvinna í 1963. Hon stóð í læru hjá P/F Shell á Viðarnesi í Havn.

Hon hevur m.a. arbeitt á Fornminnissavninum 1970-80, á Dansk Sygeplejeråd Føroya deild 1980-85 og á Sendistovuni frá 1985. Hon hevur eisini merkonomútbúgving.



Brynhild arbeiðir sum attaché á føroysku sendistovuni í Keypmannahavn.

**Dagurin**

**9. februar. Appolonia**, deyð umleið ár 250. Ein kona í Aleksandriu, sum fyri trúar sakir varð pínd og dripin. Halgisøgan sigur, at hon fekk allar tenninar trektar út og varð síðani brend á báli. Hon er verndarhalgimenni hjá tannlæknum. Navnið er eftir grikska gudinum Apollon, hin ljómandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara høgt elskaða mamma, omma, langomma og vermamma

**Johanna Elisabeth Nielsen**
Nólsoy (vanliga nevnd Betty)
ættað av Oyrareingjum

andaðist og varð jarðað.
Takk til Sonju Klein, prest, fyri troystarrík orð í kapellinum á Lágargarði og í kirkjuni. Takk til Rodmundur í Liða fyri góð orð við jarðarferðina.
Ein serlig tøkk til langommudøturnar, Jónhild og Sólvá, fyri vakran sang og violinspæl, í kapellinum og kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Takk til tykkum á Heimarustovu á Lágargarði, ið vóru um mammu, ta tíðina hon var har, við góðari hjálp og umsorgan, takk at tit vóru so góð við hana.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Lágargarð.
Eisini takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

Gud vælsigni hvønn einstakan av tykkum.

*Familjunnar vegna*
**Bernhild og Dagny**